Útvarp Føroya:

# Vilja gera tað øðrvísi

**Útvarp Føroya hevur stórar ætlanir í sambandi við løgtingsvalið. Í longri tíð hevur útvarpið arbeitt við einari skrá til valið, ið m.a. inniheldur eitt valting og politiskt orðaskifti**

ÚTVARP
*Heri á Rógvi*



*Útvarpsfólk fáa nógv at gera, nú tað stundar til valið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen.*

Øðrvísi og meira spennandi valsendingar.

Soleiðis ljóðar yvirskriftin á tíðindaskrivinum, sum útvarpsstjórin býtir út millum tey innkallaðu fremmandu tíðindafólkini.

Kendar røddir hava sett í stólarnar í tí nú afturlatna tingssalinum í hølunum hjá Útvarpi Føroya upp í Sorturdíki. Tað er heilt vist, at tey trívast, og henda dagin hava tey eisini á pappíri eins og í talu.

Evnið er løgtingsvalið. Tað er í sambandi við hetta sama valið, at útvarpið vil gera tað øðrvísi.

Útvarp Føroya hevur í longri tíð arbeitt við einari ætlan, sum skal hetta løgtingsvalið til tað mest hoyrda nakrantíð.

### Í máltráð

Stjórin í Útvarpi Føroya, Jógvan Jespersen, greiddi frá, at teir hava arbeitt við einari ætlan í sambandi við løgtingsvalið í longri.

–Tað gjørdist greitt fyri langari tíð síðani, at løgtingsval skuldi verið og nær tað skuldi vera. Vit hava sostatt havt langa tíð at fyrireika okkum í, soleiðis at vit hava kunnað sett fólk av og fyrireika sendingar, sigur Jógvan Jespersen.

Hann vil ikki siga, hvussu stórar upphæddir henda ætlanin hevur kostað.

Og tað er heldur ikki so lítið, Útvarp Føroya hevur á skránni.

Frá 17. apríl verður máltráður við politiskum flokki. Hesir sendingar verða tilsamans seks í tali. Hvør flokkur sleppur at sita í útvarpsstovuni ein av teimum seks gerandisdøgunum, sendingarnar verða sendar. Eitt fólk úr útvarpinum verður vertur fyri sendingini, og flokkarnir hava trý umboð við sær.

Ætlanin er, at tann vanligi veljarin skal sleppa framat, onnur valevni sleppa ikki framat.

### Valting

Av øðrum sendingum, ið Útvarp Føroya fer at senda í sambandi við, er sendingin valagn. Hetta er ein sending, har útvarpsmenninir, Gunnar Skúvadal og Kári Durhuus, fara ymsastaðni kring landið fyri at kanna, hvørji agn verða nýtt í valstríðnum.

Flokkarnir fáa eisini høvi til at sleppa framat í sendingum uttan at nakað útvarpsfólk luttekur.

Ein sokallað valting verður eisini. Fyrst er floksformaðurin í andgletti og síðani verður farið við honum í valtingið, har hvør flokkur hevur fimm umboð. Floksformaðurin fær tvey fólk at hjálpa sær.

Eisini verður skipað fyri tveimum politiskum orðaskifti. Onnur av hesum sendingum verður saman við Sjónvarpi Føroya.

Sjálvan valdagin ger Útvarp Føroya eisini nógv burturúr.

# Fjarhitaprísurin er ov høgur

Ein nevnd hevur staðfest, at fjarhitaprísurin er ov høgur. Prísurin verður nú settur niður, og hetta merkir eina sparing aljóðandi einar 1.400 kr. um árið fyri eitt húsarhald.

Prísurin á fjarhita hjá Fjarhitafelagnum er ov høgur. Hetta staðfestir ein kanningarbólkur. Nevndin í Fjarhitafelagnum, sum letur fjarhita av brennistøðini í Havn, samtykti á fundi hin 13. september at seta ein óheftan bólk av serfrøðingum at kanna prísviðurskiftini. Orsøkin var, at ivur var reistur um prísin á fjarhita.

Úrsltið hjá serfrøðingabólkinum var, at núgaldandi fjarhitaprísurin 0,525 kr/kWh verður lækkaður til 0,45 kr/kWh, og at fasta málaragjaldið verður 500,00 kr uttan MVG.

Roknað verður við, ein miðal sethúsabrúkari fer at spara einar 1.400 krónur við nýggju prísunum. Hetta fær gildi frá 1. januar 2002 og verður avroknað í ársuppgerðini.



*Brennistøðin í Havn, har fjarhitafelagið húsast*

Sjónvarp Føroya:

# Við til valfundir kring landið

Sjónvarp Føroya ætlar sær við til valfundir kring landið. Alt hetta er partur av einari størri ætlan í sambandi við løgtingsvalið Sjónvarp Føroya hevur eisini umfatandi ætlanir í sambandi við løgtingsvalið. Tað farmgongur av ætlanunum hjá teimum, at teir m.a. skulu vera við til valfundir kring landið. Teir vera í Eysturoynni, í Hvalba og í Klaksvík.

Flokkarnar sleppa allir at hava eina framløgu í sambandi við sendingar, har flokkurin er í andgletti. Eisini ger Sjónvarpið nógv burturúr sjálvan valdagin og saman við útvarpinum skipa teir fyri valfundi í Norðurlandahúsinum.

Sum heild hevur Sjónvarp Føroya gjørt nógv burturúr.

–HR



*Sjónvarpsfólkini Katrin Petersen og John Johannesen.*



# Fjotti og Bobo í Lognbrá

**Nú sunnudagin hava norðoyingar aftur møguleika at síggja teir báðar Fjotta og Bobo gera síni mongu kynstur**

UNDIRHALD
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Sunnudagin 14.04.02 klokkan 16 fara Fjotti og Bobo at undirhalda í Klaksvík. Tiltakið er ein partur av bilsølustevnuni í Klaksvík. Tiltakið var eisini í fjør, og royndist tað so væl, at Fjotti og Bobo vórðu bidnir aftur í ár.

– Á henda hátt kunnu foreldur trygg fara at hyggja eftir bilunum, meðan klovnarnir undirhalda børnunum, sigur ein av fyrireikarunum. Fjotti og Bobo skulu sostatt upptraðka til barnatiltakið í Lognbrá sunnudagin klokkan 16, og komandi vikuskiftið verða teir við á Føroya vikuni í SMS, har teir fara at gera mangt spennandi.

Á skránni hjá teimum eru gandakynstur, sangur og ikki at gloyma, tey mongu spennandi ballóndjórini.

Eftir ætlan fara teir báðir Fjotti og Bobo til Danmarkar á Hvítusunnu, har teir skulu vitja Pjerrot, sum var í Føroyum herfyri. Teir skulu venja og upptraðka saman við mongum øðrum á einum trúboðara tiltaki á Mors.

Sosialurin frættir, at Fjotti og Bobo hesa seinastu tíðina hava gjørt nógv við at venja. Jákup Veyhe, sum vit millum annað kenna frá Pipar og Salt, og sum hevur leikstjórnað skemtileikunum Mostir Charley og Renn fyri vívinum, hevur lagt teimum lag á. Hetta er gjørt fyri at Fjotti og Bobo skulu vera so væl fyri sum gjørligt, nú teir fara út um landoddarnar at upptraðka.

Tá Pjerrot var her á sinni, varð avtalað, at teir báðir skuldu fara til Danmarkar, so at Pjerrot kundi síggja teir bæði undir og venjing og meðan teir upptraðka.

Tá Fjotti og Bobo koma heimaftur, er Norðoyastevnan tað fyrsta tiltakið, sum er á skránni. Norðoyastevnan verður vikuskiftið 1. og 2. juni.

# Sjey00 skipar fyri konsert

**Leygarkvøldið 20. apríl skipar tónleikafelagið Sjey00 í Klaksvík fyri forvitnisligari konsert í Mentunarhúsinum Atlantis**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Nevndin í felagnum er nú farin í gongd við at fyrireika fyrstu konsertina hjá fyrsta tónleikafelagnum í Klaksvík.

Luttakandi bólkarnir á konsertini verða Iris, Stinkfist (Remote) og Chain. Hetta eru alt bólkar, sum hava tilknýti til Klaksvíkina.

Bert ein konsert verður á skránni á hesum sinni, og verður kostnaðurin 100 krónur. Tó sleppa limir inn fyri 80 krónur.

Sama dagin skipar tónleikafelagið eisini fyri einum aðalfundi í Býráðshøllini. Hesin fundur verður klokkan 17.00, og fáa áhoyrararnir eisini møguleika at tekna seg sum lim hjá Sjey00 á fundinum.

# Norðborg á svartkjafta veiðu

**Aftan á at hava verið á lodnuveiðu í Barentshavinum í einar tveir mánaðir fer Norðborg nú á svartkjafta veiðu. Christian í Grótinum er eisini á svartkjafta veiðu eftir stórar umvælingar á brúnni**

FISKISKAPUR
*Solby A. Eliasen*

Norðborg kom inn á Klaksvíkina hóskvøldið úr Barentshavinum. Teir hava fiskað lodnu í einar tveir mánaðir til japanska marknaðin og landað í Norra. Kristian Martin Rasmussen sigur, at fiskiskapurin hevur verið hampuligur hesa sesongina.

Steðgurin hjá Norðborg verður ikki langur í Klaksvík, teir fara á svartkjafta veiðu leygardagin.

Christian í Grótinum er nú aftur farin í fiskiskap eftir umfatandi umvælingar á brúnni. Brúgvin fekk stóran skaða eftir at skipið her fyri fekk ein sjógv. Øll brúgvin, sum hon er, er útskift. Christian í Grótinum er á svartkjaftaveiðu, men fiskiskapurin seinastu dagarnar hevur verið smáligur, sigur Kristian Martin Rasmussen, sum er sera harmur um, skaðan sum skipið fekk.

– Vit hava mist nógv, teir fjúrtan dagarnar, tað tók at umvæla skipið, tí fiskiskapurin júst tá var sera góður, sigur hann.

# Kjølbrotrolarar hampuligan fiskiskap

FISKISKAPUR
*Solby A. Eliasen*

Fuglberg var í Eystur-Grønlandi og fiskaði rækjur í góðar tveir mánaðir. Teir høvdu 170 tons. Fuglberg er aftur í Eystur-Grønlandi nú.

Næraberg kom á fiskileið fyrr í vikuni. Hann er í føroyskum sjógvi og hava teir hampuligan fiskiskap.

Sundaberg fór eisini avstað aftur fyrr í vikuni í Barentshavi á fiskiskap. Teir høvdu 780 tons á seinasta túri, sum vardi einar tríggjar mánaðir. Sundaberg verður væntandi aftur umleið tríggjar mánaðir burtur hesuferð.

Sjúrðarberg er við Bjarnoynna. Hann er undir polskum flaggi, men har eru tó nógvir føroyingar við kortini. Sosialurin frættir, at fiskiskapurin er smáligur hjá teimum.

# – Vit fara ikki at lesa til pedagog!

**Magnus og Poul Jacob ganga báðir í 10. flokki í Klaksvík, og saman við hinum floksfeløgunum hava teir í tvær vikur verið í starvsvenjing. Felags fyri hesar báðar er, at teir hava valt sær eitt heldur øðrvísi starvspláss, enn dreingir vanliga plaga at gera**

STARVSVENJING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Magnus Mikkelsen og Poul Jacob Poulsen hava í tvær vikur rokast millum børn í starvsvenjingartíð teirra.

Vinirnir báðir høvdu hug at royna okkurt øðrvísi, nú teir fingu møguleikan til tað, og ti valdi teir at fara at arbeiða millum børn. Hóast teir royndi at sleppa í sama stað, so eydnaðist hetta tó ikki.

Sosialurin hevur hitt teir báðar til eitt lítið prát, har vit millum annað spurdu, hvussu teir trívast millum øll hesi børnini.

### Magnus Mikkelsen, 17 ára gamal



Er í starvsvenjing í frítíðarskúlanum Sornhúsinum

– Eg havi roynt alt uttan at vera til skips og at arbeiða millum børn. At fara til skips verður tað síðsta, eg nakrantíð geri, og so var bert at fara í gongd við børnini.

Meðan vit tosa við Magnus, standa fleiri 7 ára gamlar gentur rundan um hann. Tær práta og fnisa, og væl sást, at Magnus er væl dámdur teirra millum.

– Jú, hetta er ordiliga stuttligt. Genturnar eru forliptar, og dreingirnir eru glaðir fyri at hava fingið onkran at spæla bólt við, sigur Magnus.

Magnus fortelur eisini, at vinirnir høvdu hug at flenna eitt sindur, tá hann segði teimum, at hann skuldi í starvsvenjing í einum frítíðarskúla. Sjálvur heldur hann, at tað er eitt sindur øðrvísi at arbeiða millum børn, men hann hugnar sær.

– Eg havi verið úti við teimum, og so hava vit spælt nógv.

Men hóast hann hugnar sær, so hevur hann ongar ætlanir um at fara at lesa til pedagog.

– Nei, tað er eitt sindur for strævið, sigur hann.

Magnus sigur eisini, at hann gleðir seg ikki til at skula fara frá børnunum aftur.

– Eg hevði viljað, at starvsvenjingin var eitt sindur longri. Nú eri eg komin at kenna børnini, og eri vorðin góður við tey, so eg havi ongan hug at fara avstað aftur, sigur hann at enda.

### Poul Jacob Poulsen, 17 ára gamal



Er í starvsvenjing í Útibarnagarðininum úti í Grøv

– Eg ætlaði fyrst at fara í Studio Pegasus, men tey tóku ikki ímóti praktikantum júst nú. Síðan royndi eg okkurt annað eisini, men tað gekk heldur ikki so gott. At enda valdi eg so at royna meg millum børn, og tí eri eg her, greiðir Poul Jacob frá.

Hann sigur eisini, at fyrsti dagurin var so ræðuligur, at hann ætlaði sær bara at gloyma alt um starvsvenjingina, og ikki møta aftur.

– Men tíanbetur fór eg aftur til arbeiðis, og nú trívist eg ordiliga væl, smílist hann.

Eisini genturnar í útibarnagarðinum dáma væl, at okkurt mannfólk er til staðar. Tær hava hingið uppí Poul Jacob allatíðina, og dreingirnir eru eisini fegnir um at hava fingið onkran "mannin" út.

Sum navnið sigur, so nýta børnini í útibarnagarðinum nógv av tíðini uttandura. Poul Jacob sigur, at gott veður hevur verið allar dagarnar, og tí hevur hann verið nógv úti saman við børnunum.

– Vit hava eisini verið ein túr uppi á Kjøli; ein frálíkur túrur, greiðir hann frá.

Men Poul Jacob hevur ongar ætlanir um víðari samstarv við børnum.

– Nei, eg hevði ikki havt tol til at farið at lært til pedagog, flennir hann.

Hann greiðir eisini frá, at hóast børnini eru fitt og siga nógv stuttlig ting, so gleðir hann seg til at sleppa aftur í skúla.